# Teir bí›a framvegis í Klaksvík

*Bólkur 1: Kavin hev›i vi› sær, at dysturin móti VB var› útsettur. Nú eigur KÍ tveir dystir á, og klaksvíkingar bí›a framvegis eftir at síggja fótbólt á heimavølli*



Klaksvíkingar havi ikki sæ› ein t‡dnigarmiklan fótbóltsdyst á heimavølli sí›ani teir leygardagin 2. oktober í fjør sóu teirra li› vinna meistaraskapin.

Tá var ve›ri› vánaligt, og vøllurin stó› undir í vatni. Sunnudagin skuldi VB havt veri› í Klaksvík, men dysturin var› avl‡stur. Kavin var so miki› nógvur nor›anfyri, at ta› var ikki hugsningur um at spæla. Hetta var› avrátt í so miki› gó›ari tí›, at vágbingar fingu bo›ini, á›renn teir fóru úr Su›uroy.

Klaksvíkingar høvdu glett seg til at síggja teirra li› f‡ra fer›ir á heimavølli í eina stóra viku. Umframt dystin móti VB, skulu teir sambært skránni spæla á heimavølli móti Sumba skírisdag, páskaaftan skal NSÍ vitja í steypakappingini, og annan páskadag skal NSÍ spæla landskappingardyst í Klaksvík.

## Óvissan

Ta› er kortini eitt sindur ivasamt, hvussu ta› ver›ur vi› fótbóltsspælinum í Klaksvík komandi dagarnar. Ta› er framvegis kavi á vøllinum, og ve›urvánirnar eru ikki serliga gó›ar. Hann sigur framvegis høgætt, og harvi› er sannlíki› stórt fyri kava.

Umframt kavan er ta› ein veruleiki, at einki enn er gjørt fyri at bøta um dreningina, sum hevur veri› út av lagi vánalig sí›ani n‡ggi graslíkisvøllurin var› lagdur á. Hetta hevur vi› sær, at vatni› fer ikki so skjótt burtur, tá kavin hvørvur, sum ta› hev›i havt veri› møguleiki fyri, um dreni› var, sum ta› átti at havt veri›.

Klaksvíkingar eiga nú tveir dystir á í steypakappingini á. Hin er móti NSÍ í Runavík. Í sí›stu viku løgdu teir í NSÍ uppskot fyri KÍ um at spæla í Runavík sí›sta fríggjakvøld, men ta› var› av ongum. Í gjár frættist, at dysturin í Runavík ver›ur í kvøld klokkan sjey.

*Ta› er neyvan nakar ivi um, at KÍ og NSÍ fara ví›ari úr bólki eitt. Enn hava hesi bæ›i li›ini ikki spælt móti hvørjum ø›rum í bólkaspælinum, men komandi dagarnar fara tey at strí›ast nógv móti hvørjum ø›rum. Í steypakappingini hittast tey í Runavík í kvøld og í Klaksvík leygardagin, og mándagin skal NSÍ spæla landskappingardyst í Klaksvík.*

# NSÍ seg›i takk fyri seinast

*Bólkur 1: Líkindini vóru stak vánalig, tá sumbingar á heimavølli so rudduliga vór›u settir upp á pláss*



Ta› tók dygt, tá NSÍ í fyrsta steypadystnum á árinum tapti 1–0 á heimavølli móti Sumba. Tí var ta› ikki torført hjá venjaranum, Trygva Mortensen, at seta sínar spælararar upp, tá teir sunnudagin vitja›u í Sumba.

NSÍ vann 5–0. Teir í Runavík eru gla›ir fyri sigurin, og teir eru serliga væl nøgdir vi›, at ta› eydna›ist at fáa dystin frá hondini sunnudagin. Tí líkndini vóru einki serlig í Sumba. Har var eingin kavi, men har var nógvur vindur. NSÍ hev›i vindin ímóti í 1. hálvleiki, og í 2. hálvleiki øtla›i hann ve›ri›.

## Málini

Fyrra umfari› var hálvrunni›, tá NSÍ fekk hol á. Gert Langgaard sneiddi fleiri av á baklinjuni í vinstru, og unglingaspælarin Brynjolvur Nielsen var púra blankur, tá Gert sendi út frá.

NSÍ var leikliga greitt omaná, og í 37. minutti øktu teir. Eftir uppspæl í vinstru sendi Jónstein Petersen til handara stólpa, har mi›vallarin Sonni L. Petersen setti fótin á.

Sumbingar royndu at tr‡sta undan vindinum, og serliga fyrstu tíggju minuttirnar í seinna umfarinum leika›i á frammanfyri máli› hjá Rúna Joensen. Men uppløgdu møguleikarnir vóru fáir. Birgir Jørgensen, sum í 1. hálvleiki úr gó›ari stø›u eftir uppspæl úr høgru og innlegg hev›i sent á málverjan, var púra leysur í 2. hálvleiki, men ta fer›ina sendi hann vi› sí›una av málinum.

Verjan hjá sumbingum gjørdist alt leysari, og tá NSÍ økti til 3–0, fór luftin úr teimum á heimali›num. Tri›ja máli› var eitt ordulig piltamál. Christian Høgni Jacobsen fanga›i málspark frá sumbingum og sendi bóltin í tóma máli›, og so gekk skjótt. Eftir innkast úr høgru og inn í brotsteigin snara›i Christian Høgni Jacobsen tveir av sær og smekka›i dygst ni›ur vi› handaru stólparót. Mortan Hansen, sum sí›sta hálva tíman loysti Gert Langgaard av, setti sí›sta naglan í. Eftir horna úr vinstru royndi Sonni L. Petersen móti málinum, og Mortan Hansen rætta›i bóltin av, so hann fór í kassan.

## Sakna›u fleiri

Sumbingar hava ikki nógv fólk, og tí er ta› altí› smeittur hjá teimum, tá onkrir av føstu monnunum eru burturfrá. Hesa fer› var Páll Magnar Kjærbæk skaddur. Jan Poulsen og Eirikur Joensen vóru heldur ikki vi›.

Hjá NSÍ var Ian Højgaard ikki vi›. Hann var burturstaddur, men hann ver›ur tøkur aftur skírisdag.

**Sumba:**
Egil Olsen,
Mortan úr Hørg,
Bergur Vinther,
Marlon Kjærbo,
Spasojé Biberdzic,
Tummas Jóhan Thomsen,
Hallur Dam Joensen,
Nikola Biberdzic,
Hans Jákup Thomsen,
Birgir Jørgensen,
René Thomsen.

**NSÍ:**
Rúni Joensen,
Kári Hansen,
Arnfinn Langgaard,
Dánial Hansen,
Sjúr›ur Jacobsen,
Sonni L. Petersen,
Brynjolvur Nielsen, Djóni N. Joensen, Jónstein Petersen, Christian Høgni, Jacobsen,
Gert Langgaard.



# Jens Kristian skal vera generalur á mi›vøllinum

*Bólkur 2: B36 royndi n‡ggja uppstilling móti ÍF, sum var› sent til hús vi› stórum ósigri á bakinum*



*Eftir stórsigurin á ÍF tykist B36 at vera á rættari lei›*

Ein av stóru spurningunum undan kappingarbyrjan hevur veri›, hvussu ta› stendur til hjá B36, sum hevur mist so nógv fólk sí›ani í fjør. Úrslitini í bólkaumfarinum hava ikki veri› sannførandi. Eitt er, at teir taptu á Svangaskar›i, har teir ofta hava havt trupulleikar. Naka› anna› er, at teir í Fuglafir›i taptu móti 2. deildarli›num har nor›uri.

Sunnukvøldi› hev›i B36 høvi at vísa trúføstu ásko›arunum, at teir eru á rættari lei›, og at teir ætla sær at gera seg galdandi í landskappingini.

ÍF var fullkomuliga sett upp á pláss. Ta› var 3–0, tá fimm minuttir vóru farnir, og so var einki at spæla um. Fuglfir›ingar taptu 6–0, og um B36 menninir sí›stu løtuna, tá teir høvdu skift tríggjar menn inn á vøllin, høvdu veri› meiri nærlagdir, so kundu teir havt skora›i uppaftur fleiri mál.

Sigurin var sjálvsagt kærkomin, men hóast fuglfir›ingar vóru stak tannleysir, so vísti avriki› eisini, at svenski venjarin hjá B36 er komin væl nærri røttu uppstillingini.

Hesa fer› hev›i hann sett Jens Kristian Hansen fram á mi›vøllin, har hann spældi vi› sí›una av Jan Guttesen, me›an Ronnie Samuelsen var frammanfyri.

Jens Kristian var meiri ey›s‡ndur sum st‡rima›ur, nú hann var á mi›vøllinum, og ta› lyfti li›i›. Avriki› bo›a›i frá, at Jens Kristian eftir øllum at døma ver›ur mi›vallari, tá ta› um eina lítla løtu ver›ur fari› undir landskappingina.

At li›forma›urin á landsli›num setti hol á málveitslluna vi› einum máli, sum var ógvuliga skotskt, var prikkurin yvir inum. Jákup á Borg leg›i innfyri úrhøgru, og úr tíggju metrum drønstúta›i Jens Kristian upp í málhorni› aftanfyri Allan G. Joensen.

## Veitslan

Longu í 2. minutti setti Jens Kristian hol á, og ein minutt seinni spældi John Petersen Jákup á Borg púra leysan, me›an tríggir verjuspælarar hugdu at. Tveir minuttir seinni vóru fuglfir›ingar kroystir at gera sjálvmál, og tá var› lagt upp til, at sigurin kanska skuldi gerast tvísifra›ur.

ÍF hev›i ongan málmøguleika. John Petersen økti undan ste›ginum til 4–0 eftir uppspæl í vinstru og eftir at Jákup á Borg ógvuliga snilt var lopin upp um bóltin.

John Petersen leg›i vi› høvdinum bóltin fyri føturnar á Jákupi á Borg, sum skora›i til 5–0, og Dánial P. Johansen, sum saman vi› Carl H. Høgnesen og svianum Haakan var komin inn, tá ta› resta›u tíggju minuttir, økti til 6–0. Hann var púra leysur, tá hann skora›i.

## Moyrir

Nógvir av fuglfir›ingunum eru ungir spælarar, sum hava fáar royndir í fremstu rø›. At teir eftir fimm minuttir vóru aftanfyri 3–0 tók fullkomuliga beinini undan teimum, og teir komu ongantí› í nánd av tí ágr‡tna og sannførandi avrikinum, sum teir s‡ndu, tá teir vunnu 3–2 á B36.

Rúni Petersen var sera ey›s‡ndur sum einsamallur álopsma›ur, og Høgni Zachariassen vísti í fyrsta dystinum fyri besta ÍF li›i› í Gundadali gó› fótbóltsevni. Hinir spældu ikki væl.

Fuglfir›ingar lógu ov langt frá mótstø›umonnunum, og tá teir endiliga fingu tak á bóltinum vóru møguleikarnir at spæla ví›ari fáir og smáir.

Petur Mohr, sum bara hev›i tríggjar teirra á li›num, sum vóru vi› í landskappingardystinum móti B36 í Gundadali í fjør, royndi at skifta út, uttan at stórvegis spurdist burturúr tí. Sigfrí›ur Abrahamsen kom eftir ein gó›an hálvan tíma, og í 2. hálvleiki kom Jákup Baldvinsson á vøllin.

Trupulleikin hjá ÍF er, at fleiri spælarar eru skaddir, og ta› er ikki vist, at teir ver›a tøkir til fyrsta landskappingardystin. Bár›ur á Lakjuni og Bár›ur Mortensen eru farnir at renna aftur, me›an Janus Petersen er langtí›arskaddur. Roy Róin var› skaddur sunnudagin og ver›ur neyvan tøkur fyrstu vikurnar.

**B36:**
Tróndur Vatnhamar,
Mikkjal Thomassen,
Egil Zachariasen,
Fró›i Clementsen,
Bjarni Prior,
Jan Guttesen,
Ronni Samuelsen,
Jens Kristian Hansen,
Magni á Lakjuni,
Jákup á Borg,
John Petersen.

**ÍF:**
Allan G. Joensen,
Viggo Johannesen,
Torstein Joensen,
Alvi Justinussen,
Tomek,
Hjalti Lundsbjerg,
Roy Róin,
Rúni Jacobsen,
Høgni Zachariasen,
Ken Bærendsen,
Rúni Petersenl.

# Fleiri lyklaspælarar skaddir

*Bólkur 2: Toftamenn hava rættuliga havt undanvind í bólkaumfarinum*

Um vit meta út frá úrslitunum, so kann ikki sigast anna›, enn at ta› rættuliga hevur gingi› undan hjá B68 í bólkaumfarinum. Fjór›a sigurin av f‡ra møguligum vunnu teir á Sandi sunnudagin.

Jóannes Jakobsen heldur seg neyvan vera komnan á mál, hvat vi›víkur at skipa bæ›i verjuspæl og álopsspæl, men ta› man kennast hugaligt, at úrslitini hava veri› so gó›.

Á hinari sí›uni var ta› ein rættuligur hvøkkur fyri B68 nú so stutt undan fyrsta umfarinum í landskappingini, at tveir av lyklaspælarunum noyddist av vøllinum, tá dysturin var hálvrunnin. Talan var um vongverjarnar bá›ar. Jan Petersen hev›i fingi› ein løst í fótin, og Jákup Eli Olsen hev›i trupulleikar í rygginum. Ska›arnir gjørdu, at tveir av ungu toftamonnunum – Mannbjørn Nesá og Jann Ingi Petersen – fingu dystarvenjing í fremstu rø›, og tá tjúgu minuttir vóru eftir, kom tann tri›ji ungi ma›urin, Kristian Poulsen, á vøllin fyri álopsmannin Marcello Marcolino.

Sandoyingar vóru eisini skerdir hesa fer›. Mi›vallarin Julian Floresco, sum hesa fer› skuldi vera millum teir fyrstu ellivu, var› skaddur undir venjing fríggjakvøldi›, og tískil kundi hann ikki spæla vi›. Hetta hev›i broytingar vi› sær, sum m.a. bóru pláss vi› sær í álopinum fyri bla›unga Kristoffuri Vidtfeldt.

## Málini

Ta› er framvegis sjónskt, at fótbóltsári› er ungt. Í løtum hekk spæli› væl saman, og vi›hvørt var ta› eitt sindur fløkjasligt.

Ta› er eingin loyna, at toftamenninir hava nógvar royndar spælarar, og at ta› er nógv teprari hjá sandoyingum, sum hesa fer› spældu uttan skadda Bjørn Thorsteinsson. Serliga í 1. hálvleiki vóru gestirnir leikliga greitt omaná. Í 2. hálvleiki vóru teir á heimali›num meiri vi›.

Fró›i Benjaminsen setti hol á, tá hann í høgru tamdi langan diagonalbólt úr vinstru og sendi framvi› Valdemar Nowisci. Tá vóru ellivu minuttir farnir, og 25 minuttir seinni økti Súni Frí›i Johannesen. Marcello Marcelino lyfti inn um eitt sindur tøvandi verjuna, B71 málverjin royndi at boksa bóltin burtur, men hann fór í ryggin á Jógvani Jón Petersen, og so var álopsma›urin fyrstur á.

B68 økti til 3–0, á›ren B71 slapp upp í part. Ta fer›ina var ta› Marcello Marcelino, sum skora›i.

Sandoyingar umskipa›u í 2. hálvleiki. Jógvan Jón Petersen, sum hev›i veri› mi›verji, fór í álopi›, og Ernst Løkjá kom í mi›verjuna. Tá umfari› var hálvrunni›, minka›u teir um munin. Rúni í Soylu, sum saman vi› Eli Hentze spældi á mi›vøllinum (teir hava higartil veri› í álopinum) var málskjútti.

Í málinum hava sandoyingar Valdemar Nowisci, og hann sta›festi enn eina fer›, at hann er teimum hollur. At førleikin framvegis er avbera gó›ur kom ikki minst til sjóndar, tá Øssur Hansen úr 18 metrum sendi fríspark heilt upp í málhorni›. Av Sandi frætta vit, at bjargingin hjá Valdemari var framúr gó›.

**B71:**
Valdemar Nowisci,
Bernhard Petersen,
Bergleif Sólsker,
Jón Brekku,
Jógan Jón Petersen,
Bernhard Petersen,
Rúni í Soylu,
Eli Hentze,
Kári Nielsen,
Kristoffur Vidtfeldt,
Kári Sørensen.

**B68:**
Magnus Poulsen,
Jan Petersen,
Jan Dam,
Arnbjørn Danielsen,
Jákup Eli Olsen,
Øssur Hansen,
Fró›i Benjaminsen,
Marlon Jorge,
Ey›stein Skipanes,
Marcello Marcolino,
Súni Frí›i Johannesen.